# Nýggjar hønur á Velbastað

**Við umborð á Norrønu vóru í dag 3200 øðrvísi ferðandi. Talan var um 3200 danskar hønur, sum næstu mánðarnar skulu búgva á eggvirkinum á Velbastað.**

HØSNALÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Annfinn Brekkstein tekur ímóti nýggju hønunum*

Annfinn Brekkstein og eggvirkið hansara á Velbastað tóku í dag ímóti 3200 nýggjum hønum úr Øst Timmerland í Danmark. Annfinn roknar við, at hønurnar, sum eru 15 vikur gamlar og viga upp í 1400 gram, fara at verpa um páskatíð.

- Ætlanin er, at nýggju hønurnar skulu verpa á eggvirkinum í Velbastað í 11 mánaðar, og verða tær sostatt settar út aftur í mars mánaða komandi, tá tær verða dripnar, sigur Annfinn, og leggur afturat, at hóast hann hevur fingið prógvað, at tær eru egnaðar til matnað, so hevur eggvirkið ikki umstøður at átaka sær slakt og sølu av feskum høsnakjøti sum er.

Vónandi yvirskot í ár

Annfinnur sigur seg fegnast um, at føroyingar hava tikið so væl ímóti eggunum frá eggvirkinum. Kortini er tað nústani í ár, at tey vænta, at framleiðslan gevur yvirskot.

- Tað hava verið nógvar útreiðslur, eisini óvæntaðar, og tí hava vit seintastu árini ligið á botnlinjuni og 2005 gav beinleiðis undirskot, sigur Annfinn Brekstein, sum samstundis væntar, at yvirskot verður í ár, um ikki okkurt heilt óvæntað hendur, sigur Annfinn Brekkstein.

- Men vit hava við livandi verur at gera, og tá er ikki so lætt at siga, hvussu fer at hilnast, sigur Annfinn Brekkstein, sum eisini vísir á, at tey hava minkað munandi um útreiðslurnar til olju, og í staðin gagnnýta innandura hitan betur.

Fuglakrím ongin vandi

Sambært Peter Østergaard, sum er deildarleiðari fyri Fiska- og djórasjúkudeildini, á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, er ongin vandi fyri, at hønurnar á Velbastað eru smittaðar við fuglakrími. Hann greiðir frá, at virkið hevur fingið øll tey neyðugu loyvini frá teimum, og at trygdarkrøvini í Danmark og EU eru somikið strong, at tað snøgt sagt er ógjørligt, at hønurnar eru smittaðar.

- Ongin tilburður av fuglakrími er staðfestur í økinum haðani hønurnar stava, og tær eru eisini kannaðar, tá tær enn vóru í Danmark, sigur Peter Østergaard, og hann sigur víðari, at:

- Trygdarkrøvini her í landinum eru eisini somikið strong, at bilurin við hønunum fer beinleiðis av Norrønu til Velbaðstaðar, uttan um vanliga tolleftirlitið, sigur Peter Østergaard, sum eisini vísir á, at reinførið og mannagongdirnar á eggvirkinum á Velbastað fyribyrgja smittu at koma inn í húsið.



*Tað er ein øgiligur dustur og gangur at loyva hønunum út*







*Sambært upplýsingum frá Hagstovu Føroya, er innflutningurin av útlendskum eggum minkaður við uml. 27 prosentum frá 2000 til 2005. Sostatt sæst tað á tølunum, at føroyingar eru farnir at framleiða egg sjálvir*

## Fartelefoni økir nógv um vandan fyri krabbamein

**Um tú tosar í fartelefon ella tráðleysari telefon í ein tíma um dagin, tvífaldast vandan fyri at fáa krabbamein í heilanum**

FARTELEFONI
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Ein nýggj svensk kanning vísir, at vandin fyri at fáa krabbamein í heilanum økist við 100 prosentum hjá teimum, sum tosa í fartelefon ella tráðleysari telefon í ein tíma hvønn dag.

– Hetta er fyrsta kanningin í heiminum, sum fevnir um ein bólk av sjúklingum, sum hevur nýtt fartelefon gjøgnum nógv ár, sigur Lennart Hardell, professari við Örebro Universitetssjúkrahús, og ein av granskarunum aftanfyri kanningini, við Ritzau.

Kanningin stendur í andsøgn við einari eldri danskari kanning, sum vísti, at vandin fyri krabbameini ikki var størri hjá teimum, sum tosa í fartelefon.

– Tá eg komi fram til eitt annað úrslit, er tað grundað á, at eg havi kannað sjúklingar, sum gjøgnum nógv fleiri ár hava tosað í fartelefon. So her síggja við langtíðarárinini, sigur Lennart Hardell.

Svenska kanningin varð gjørd í árunum 1997 til 2003 og fevnir um 905 sjúklingar, sum hava krabbamein í heilanum. Kanningin vísir eisini, at vandin fyri krabbameini er størstur á tí síðuni av høvdinum, sum verður brúkt til fartelefoni.

## Rithøvindafelagið aðalfund

Tvey nýggj umboð í nevndina hjá Rithøvundafelgnum

Tá Rithøvundafelag Føroya hevði aðalfund mikukvøldið 29. mars, komu tveir nýggir limir í nevndina. Úr nevndini fóru Marjun S. Kjælnes og Oddfríður M. Rasmussen, og í teirra stað vórðu valdar Vida A. Højgaard og Lydia Didriksen. Hinir tríggir limirnir í nevndini eru Heðin M. Klein, Zakarias Wang og Carl Jóhan Jensen, ið er formaður í løtuni. Nevndin skipar seg sjálva á fyrsta fundi eftir aðalfundin.

**rd**